## Føroyingur á danska landsliðnum



25 ára gamli Jákup Gardar Joensen úr Sandavági er júst úttikin til danska landsliðið í amerikanskum fótbólti. Jákup Joensen spælir dagliga við felagnum Kolding Guardians, og hevur fingið landsliðsboð, nú Danmark skal spæla ímóti Svøríki sunnudagin 22. apríl.

Jákup Gardar Joensen hevur eisini gjørt vart við seg í føroyskum ítrótti, har hann hevur vart málið hjá FS/Vágum.

## Inntakt høvuðsstuðul hjá VB/Sumba

VB/Sumba og S/pf Inntakt hava skrivað undir sáttmála, har Inntakt er høvuðsstuðul hjá felagnum.

Sáttmálin er fyribils í eitt ár, men báðir partar eru áhugaðir í at práta um at leingja sáttmálan, tá árið er farið, um alt gongst sum ætlað.

Formaðurin í VB/Sumba, Bjarni Johansen, sigur, at sáttmálin, sum er eitt slag av akkordskipan, er góður fyri felagið.

– Betri menn arbeiða, betri er tað fyri felagið, sigur Martin Hvanná Dam, stjóri í Inntakt.

– Felagið hevði sjey góð ár, síðani sjey verri ár, so nú eru sjey góð ár aftur væntandi, væntar Martin Hvanná Dam, ið rekur felagið Inntakt, ið hevur gjørt íløgur í Vági, og tí er áhugað í at stuðla ítróttinum í økinum.

# Tvey nýggj met í frælsum ítrótti

**Unga Bjørk Herup Olsen hevur sett nýtt føroyskt mett á 5 kilometra teininum í renning hjá kvinnum. Tíðin var 18 minuttir og 35 sekund og á trimum teimum seinastu oyggjaleikunum hevði hetta rokkið heiðursmerki. Randi Kúrberg hevur eisini sett nýtt føroyskt met, hetta í spjótkasti**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinasta umfar av Vetrarkappingini var í Runavík leygardagin 31. mars, og var tað góðveður og skjótar tíðir, sum merktu henda dagin. Tvey nýggj met vórðu sett.

Bjørk Herup Olsen setti nýtt met á fimm kilometra teininum hjá kvinnum. Hon rann teir fimm kilometrarnar upp á 18 minuttir og 35 sekund. Henda tíð er so mikið góð, at á trimum teimum seinastu Oyggjaleikunum hevði hon rokkið til heiðursmerki.

Vinnarar av seinasta umfarinum av Vetrarkappingini hjá kvinnum gjørdust Bjørk Herup Olsen (5 km Gentur, 18.35), Jan Elmar Sørensen (5 km Dreingir, 19,05), Fríðunn Steinberg (10 km Kvinnur, 48,13), Guttorm Sørensen (10 km Menn, 33,15) og Jósvein Herup Olsen (10 km Menn Veteranar, 38,10).




*Bjørk Herup Olsen hevur sett nýtt føroyskt met í 5 kilometur renning við tíðini 18 minuttir og 35 sekund*

*Mynd: athletics.fo*

### Enn eitt føroyskt met til Randi Kúrberg

2. páskadag varð kappast í spjótkast, hamarkast, diskuskast og kúlustoyt á kastivøllinum við Eysturskúlan í Havn. Veðrið var ringt og umstøðurnar at kappast vóru ógvuliga keðiligar. Men tað var tó onkur, sum fekk nakað gott burtur úr.

Randi Kúrberg setti nýtt føroyskt met í spjótkast, tá hon kastaði spjótið 34,52 metrar. Randi átti sjálv gamla metið, men 2. páskadag varð hetta bøtt við 44 centimetrum.

Randi royndi seg eisini í hamarskast. 34,53 metrar gjørdist úrslitið og er tað hennara triðbesta úrslit nakrantíð.

Í diskuskast kastaði Heri Ziska 43,20 metrar. Tað er longur enn oyggjaleikakravið, og hevði tað eisini rokki til eitt heiðursmerki á seinastu Oyggjaleikum.

# Onglendingar í Champions League-finaluni

**Tað gekk júst sum væntað hjá Liverpool, sum vann tryggan sigur á PSV, og AC Milan skúgvaði allan iva til viks á Allianz Arena, við at skora tvey mál uppá fimm minuttir, sum at enda gav teimum sigurin**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Liverpool lat ongantíð nakran iva vera um, at teir vóru nógv tað betra liðið, tá seinna hálvfinalan móti PSV Eindhoven varð spæld á Anfield Road í Liverpool. Uttan stórvegis hóvasták og við monnum sum Jamie Carragher, Steven Gerrard og Dirk Kuyt á beinkinum trillaði Liverpool ein tryggan 1-0 sigur í hús, so teir samanlagt vunnu 4-0 á hollendska liðnum.

Dysturin var annars lítið undirhaldandi og sera fáir málmøguleikar vóru – júst sum tey flestu høvdu roknað við. Liverpool kendi onga trongd til at spíla seg út og staðfesta sína støðu, og PSV formáddi ikki at hótta enska stórfelagið nakrantíð.

Tá tað restaði hálvur tími varð ein PSV-leikari vístur av vøllinum. Ein harðlig takling frá Dirk Marcellis, men eitt bíligt reytt kort, sum bara gjørdi uppgávuna hjá Liverpool lættari.

Fáar minuttir eftir útvísingina skoraði Peter Crouch einasta málið í dystinum, tá hann beindi avleveringina frá Robbie Fowler í netið. Fowler kom inn tíðliga í fyrra hálvleiki, tí Craig Bellamy gjørdist skaddur.

Dysturin endaði 1-0 og Liverpool skal sostatt møta Chelsea í hálvfinaluni mikudagin 25. apríl.

### Sigurin avgjørdur uppá 5 minuttir

Innanfyri fimm minuttir miðskeiðis í fyrra hálvleiki skoraði AC Milan tey bæði einastu málini í útivallar dystinum móti Bayern München.

Fyrst skoraði vælleikandi Clarence Seedorf við frálíkum langskoti, og síðani økti málrevurin Filippo Inzaghi eftir upplegg frá Clarence Seedorf.

Í seinna hálvleiki royndu týskararnir at trýsta italska liðið, men burtursæð frá skotroyndum úti frá og onkrum kjansi aftrat, so hevði týska liðið lítið at bjóða uppá.

Tíggju minuttir fyri leiklok kundi spenningur tó komi aftur í dystin, men málverjin Dida bjargaði flott, tá Pizzaro stútaði úr stuttari fjarstøðu.

Bayern München hevði snøgt sagt ikki tað, sum skuldi til fyri at koppa Milan, ið nú møtir Manchester United í hálvfinaluni. Teir spæla týsdagin 24. apríl..

Úrslitini av 1/8 finalunum merkja, at tað í ár vera trý ensk og eitt italskt lið í hálvfinalunum í Champions League. Tað merkir víðari, at tað verður ein rein ensk uppgerð í aðrari finaluni, sum aftur merkir, at tað longu nú er greitt, at annað liðið í sjálvari finaluni kemur úr Onglandi.




*Eftir at Liverpool vann í gjárkvøldið er greitt, at annað liðið í Champions League-finaluni kemur úr Onglandi*

*Mynd: Polfoto*